# Timburmenninir mugu vekk

**VB hevur ikki ráð at missa, um trumfarnir í FM-spælinum ikki skulu gleppa teimum av hondum, og VÍF skal hinvegin reisa seg eftir smeitin seinasta vikuskifti**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*




*VB hevur tað vanliga trupult í Havn, men tær hava neyvan ráð at tapa, um sleppast skal undan einum altavgerandi dysti í Vestmanna*

Eftir steyparúsin hjá VB fyri viku síðani er tað nú vorðið gerandisdagur aftur. Kvinnurnar, sum eftir tvær miseydnaðar royndir loksins vunnu steypakappingina, hava eisini møguleikan at strúka avstað við FM-heitinum, og tað er eingin ivi um, at sum støðan er í løtuni, so er hetta júst tað, tær hava í kvittanunum.

### Burtur við timburmonnunum

Á stigatalvuni er VB í løtuni tvey stig framman fyri VÍF, umframt at tær hava leikt ein dyst færri. Tær sita tí eisini við bestu kortunum, men tó ikki so, at tær hava stórvegis ráð til at missa nakað. Í øllum førum ikki, um sleppast skal undan einum alt-ella-einki dysti í Vestmanna, tá liðini tørna saman fyri fimtu ferð í ár.

Tað er tó ein sannroynd, at tað mangan er tungt hjá liðum at spæla ein góðan dyst beint eftir ein somikið stóran sigur, sum leygardagurin var, men hjá VB eru ongar stundir til at ganga við upprættum armum. Mótstøðuliðið hesaferð er Kyndil, og traditionelt hevur VB havt tað ógvuliga trupult í hesum uppgerðum, tó at tilsvarandi dysturin í grundspælinum endaði við teprum sigri.

Seinastu dystirnir hevur Kyndil eisini sýnt somikið góðar taktir, at tær av álvara mugu roknast sum heiðursmerkjakandidatar. Ein status, sum tær eisini kunnu styrkja, um talan verður um stig sunnudagin, og so munnu tær ikki hava sama motivatiónstrupulleikan, sum VB hevur. Sálarliga er tað í øllum førum lættari at skula spæla ímóti nýkosnu steypavinnarunum, heldur enn at spæla sum nýkosin steypavinnari.

### VÍF skal reisa seg

Hitt oddaliðið, VÍF, skal eisini í eldin um vikuskiftið. Hjá teimum ræður hesa ferð fyrst g fremst um at reisa seg sálarliga, eftir at tær tvær ferðir á rað hava verið við undirlutan móti VB.

Á pappírinum er talan hjá teimum tó um lættari dyst, enn tann hjá VB. VÍF vitjar í Runavík, har Tjaldur framvegis er isolerað í botninum. Seinnu árini hevur onkra staðni millum lítil og eingin ivi verið, tá hesi bæði liðini hava spælt, men sum úrslitini í ár hava verið, so kann einki útilokast. Ikki minst, um VÍF kanska er komið í ein sálarliga aldudal, meðan Tjaldur hinvegin er til reiðar at satsa alt í vónini at vinna seg upp eftir á stigatalvuni.

# Norðurlanda-meistaraheiti fyri skúlar

**Fríggjamorgunin byrjaði NM í skúlatelving 2003**

TALV
*Tíðindaskriv*

Hetta er fyrstu ferð síðani 1997, at hendan kappingin er í Føroyum. Fleiri av føroysku luttakarunum hava verið við í fleiri ár, og hesar drúgvu altjóða royndirnar eru farnar at síggjast aftur. Fleiri av føroysku telvarunum eru nevniliga styrkismettir millum teir ovastu og eru sostatt millum favorittarnar til heiðursmerki.

Tey í Talvsambandinum dylja heldur ikki fyri at vónirnar eru góðar. “Hesuferð vænta og vóna vit, at tað ferð at ganga væl. Skal tað ikki gangast væl á heimavølli við telvarum, sum hava so góð styrkitøl er ringt at siga nær tað skal fara at ganga væl”, sigur Martin Berg, sum er ein av fyrireikarunum.

### Sterkir føroyingar

Tað er serliga í teimum eldru bólkunum at vónirnar eru góðar. Martin Poulsen og Hans Christian Simonsen eru báðir styrkismettir í ovasta triðinginum í elsta aldursbólkinum fyri teir, sum eru føddir í 1983, 84 og 85. Bæði Hans Kristian og Martin hava nógvar altjóða royndir. Umframt, at teir vóru við á OL talvliðnum í heyst, vóru teir í fleiri kappingum uttanlanda seinasta summar.

Í bólkinum fyri teir sum eru føddir í 1986 og 1987 er Olaf Berg millum favorittarnar. Ein norrmaður hevur hægsta styrkistali, men síðani koma tríggir, sum eru ógvuliga javnir, ein svii, ein dani og Olaf Berg.

Vónirnar hjá teimum føroysku telvarunum eru góðar, men teir vita eisini at skal munagott úrslit koma burturúr krevst at teir rættuliga spenna seg. Hóast allir telvarnir ikki hava so høg styrkitøl er einki at ivast í, at teir eru duganligir telvarar tí teir hava vunnið sær rætt at sleppa við til NM gjøgnum drúgvar kappingar.

Fyrsta umfarið byrjaði fríggjarmorgunin klokkan 9.00 í Norðurlanda-húsinum. Seinasta umfarið verður telvað sunnudagin klokkan 15 og heiðursmerkini vera latin eftir seinasta umfarið.

# Sannleikans tími

**Eftir at strandingar í nakrar vikur hava skinklað eitt sindur, er tað nú sannleikans tími, tá teir vitja í Hoyvíkarhøllini**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*




*Strandingar hava ikki verið sannførandi síðani vetrarsteðgin, og nú teir vitja hjá KÍF likist tað sannleikans tíma fyri teirra viðkomandi*

Tríggir dystir í bestu mansdeildini í hondbólti verða leiktir um vikuskiftið, og í øllum trimum førum tykist tað so, at tað væl kann gerast talan um heilt spennandi dystir.

### Sannleikans tími

Størsti spenningurin er helst um dystin í Hoyvík, har StÍF kemur á vitjan hjá KÍF.

Lítil ivi man vera um, at tað vóru strandingarnir, sum sýndu besta hondbóltsspælið í grundspælinum, men í endaspælinum hevur tað ikki gingið heilt so flótandi. Seinast varð hetta staðfest við einum sigri á H71, sum var fingin til vega í evstu løtu, og tað er helst so, at í løtuni hava strandingar ikki ráð til at missa nakað serligt.

Kollfirðingar hava eisini áður givið StÍF ein skarpan gang. Og fáa teir spælið í størri mun at snúgva seg um aðrar enn jugoslaviska stórskjúttan á liðnum, so er einki at ivast í, at teir kunnu vinna øllum liðunum í deildini neisur.

Í Havn skulu steypavinnararnir úr Kyndli spæla móti H71, sum veruliga hevur gjørt um seg í endaspælinum. Bæði Neistin og VÍF eru higartil knógvað undan hoyvíkingunum, og mikukvøldið var um reppið, at strandingar fingu somu lagnu. Størsti spurningurin hjá H71 er ivaleyst, hvørt teir eftir tapra tapið framvegis kunnu halda høgt.

Júst í hesum dystinum verður tað tó helst eingin trupulleiki. Talan er um lokaluppgerð, og tá grannarnir so eisini eru nýkosnir steypavinnarar, er einki at ivast í, at menn eru uppsettir.

Tað eru teir helst eisini hjá Kyndli. Sigurin í steypakappingini víst í øllum førum, at liðið kann blanda seg heilt frammi í oddinum, og so er spurningurin bara, um ov nógv er mist í grundspælinum. Laka úrtøka her ber í øllum førum við sær, at Kyndil als ikki hevur ráð at missa stig nú, um teir skulu taka nakað heiðursmerki.

Seinasti dysturin verður í Runavík, har VÍF kemur á vitjan. Ein dystur, sum á pappírinum líkist einum trggum útisigri. Ikki minst nú VÍF veruliga tykist hava fingið ferð á. Tjaldur gjørdi hinvegin ein vørr í Havn móti Neistanum, og tí kann heldur ikki avskrivast, at teir fara at gera um seg, men sum sagt, so man VÍF koritni vera størsti favoritturin hesa vikuna.



# Sørvingar hava vónina

**Hóast teir ásanna, at ÍF eru favorittarnir, so hava sørvingar á ongan hátt mist vónina um eina endurtøku av finalusigrinum í fjør**

MANSFINALAN
*Jákup Mørk*

Flogbóltslagið í Sørvági er óført fyri tíðina. Við fylgjandi sigrum á Fram og Mjølni hevur SÍ nú vunnið seg heilt nær silvurmerkjunum í landskappingini, og seinastu vikurnar eru tankarnir so smátt eisini farnir at ferðast til steypa-finaluna, sum SÍ fyri fyrstu ferð vann í fjør.

### Positivur liðskipari

Kaj á Stongum er liðskipari hjá SÍ, og tá vit hittu hann á máli undan finaludystinum tóktist tað eisiniv vera so, at spenningurin til dystin var stórur.

- Jú, tað er einki at ivast í, at lagið hevur verið gott seinastu tíðina. Uppmøtingin til venjingarnar og inensiteturin undir venjingunum hevur verið sera góður hesar seinastu vikurnar, so tað er einki at ivast í, at leikararnir gleða seg til dystin. Og við sigrunum á Fram og Mjølni átti sjálvsálitið eisini at veri í topp, so eg haldi ikki, at vit kunnu vera nógv betri fyri enn tað sama.

Hóast hann soleiðis tykist vera ógvuliga bjartskygdur, so dylir Kaj tó ikki fyri, at fuglfirðingar mugu roknast sum favorittar. Eisini hóast tað eru SÍ, sum skulu royna at verja steypið.

- Tað er nokk einki at ivast í. Talan er ikki um sama lið hjá teimum sum í fjør, og tá vórðu teir eisini raktir av øllum óhappum, sum hugsast kundu. Í ár hava tað verið teir, sum hava verið sterkasta liðið í landskappingini, men hinvegin, so ger tað einki, um vit ikki eru favorittar. Tvørtur ímóti hevði tað kanska gjørt tað uppaftur stuttligari, um vit kortini megna at vinna.

Og hóast tað er ein trupul uppgáva, so eru sørvingarnir greiðir um, hvat skal til, um talan skal gerast um sigur.

- Vit skulu fyrst og fremst hava góðar servur. Vit mugu skapa trýst á móttøkuna hjá teimum, soleiðis at teir ikki sleppa ov lætt í álopspartinum, tí tá verður tað alt ov trupult hjá okkara blokki. Álopsparturin hjá okkum plagar vanlig at rigga hampuliga væl, so tað rokni eg ikki við, verður trupulleikin. Tað eru teirra álop, sum vit skulu steðga.

- Og so skulu vit eisini fáa nakrar av teimum so sálarliga týdningarmiklu bóltunum upp av gólvinum. Tað byggir aloftast sjálvsálitið upp, samstundis sum tað sigur hinum, at tað ikki er so lætt at fáa bóltin í gólvið, so týdningurin av tí kann næstan ikki yvirmetast. Heldur ikki hóast eg ikki rokni við, at nakar leikari ferð niður við høvdinum í eini slíkari finalu.

Tá vit at enda spurdu Kaj, hví hann heldur finaludystin vera somikið serligan, er hann skjótur at svara, at tað eru karmarnir.

- Tað er jú altíð stuttligt at spæla fyri nógvum áskoðarum. Í Klaksvík móti Mjølni seinast var tað ótrúliga stuttligt, og við eini fullari ítróttarhøll er tað bara heilt fantastiskt. Yvir høvur er eitt risa stórt fokus á flogbóltinum í hesum dystunum, og bara tað at vera partur av tí, er veruliga ein uppliving. Og so er bara at vóna, at upplivingin kann verða so stór sum gjørligt, sigur Kaj á Stongum.

Og tað er nokk ikki bert fyri leikararnar, at upplivingin er stór. Seinastu dagarnar hevur pápi Kaj, Jákup á Stongum, havt úr at gera við at fyrireika áskoðararnar til dystin. Nú fast samband er, er eisini munandi høgligari at koma til og frá dystinum, so tað er einki at ivast í, at talan verður um heilt nógvar sørvingar, sum hesa ferð leggja leiðina til Havnar, har vónin er, at tað verður teirra lið, sum verður steypavinnari.




*Í fjør lyftu sørvingar steypið, og tó at teir ásanna, at ÍF er favoritturin í ár, so hava sørvingar á ongan hátt mist vónina um ein sigur*

# Nú skal dómarin spæla

**Rúni Weihe hevur trý ár á rað dømt flogbóltsfinalurnar. Leygardagin skal hann fyri fyrstu ferð vera við sum leikari**

MANSFINALAN
*Jákup Mørk*

- Tað er sjálvsagt nakað, sum eg gleði meg til. Steypafinalan er avgjørt størsta einstaka hendingin í føroyskum flogbólti, og karmarnir kring hesa gerast alt meira professionellir.

Somikið avgjørdur er Rúni Weihe, sum í ár spælir við ÍF, tá vit undan steypafinaluni leygardagin spyrja hann, hvussu hann sær fram til at gerast partur av hesum dystinum.

Ikki tí, Rúni hevur á hvørjum ári verið við í steypafinalunu, men tað hevur hvørja ferð verið sum dómari higartil.




*- Fyri feløgini hevur hon kanska størri týdning enn landskappingin. Stuðlarnir eru sjónligir í beinleiðis sjónvarpssending alla tíðina, og tað ivist eg ikki hevur eitt veldugt virði fyri feløgini, heldur Rúni Weihe*

### Størri í allar mátar

Tá tosið fellur nærri inn á alt tað, sum sermerkir ein finaludyst, er sjkótt at Rúni aftur staðfestir, hvussu stóran týdning ein slíkur dystur hevur.

- Sjálvandi er meistaraheitið nakað, sum hevur eitt størri ítróttarligt virði. Tá er tað jú nógv størri krøv um stabilitet v.m., sum verða sett, so í so máta, kann steypafinalan ikki standa mát. Men sum einstøk hending er eingin ivi um, at týdningurin er ovurstórur. Ja, fyri feløgini hevur hon kanska størri týdning enn landskappingin. Stuðlarnir eru sjónligir í beinleiðis sjónvarpssending alla tíðina, og tað ivist eg ikki hevur eitt veldugt virði fyri feløgini. Fyri leikararnar hevur tað sjálvandi eisini týdning, at allir miðlar eru á staðnum. Saman við áskoðarunum gevur hetta nakrar karmar, sum eru nærum perfektir, og nú stórskíggi og gólv eisini eru við, dugi eg illa at síggja, hvussu karmarnir krng eina ítróttarhending kunnu gerast meira professionelt her heima.

Um sjálvan dystin tykist Rúni saman við liðfeløgunum at hava hampuliga góðar vónir um, at tað hesa ferð skal bera til hjá ÍF at hevna steypatapið fyri SÍ í fjør.

ÍF hevur annars havt ein lítlan niðurtúr í seinastuni, har teir hava tapt fyri bæði Fram og Mjølnir, men hetta er tó ikki nakað, sum tykist nerva Rúna stórvegis.

- Sjálvur haldi eg, at vit bert hava spælt ein vánaligan dyst í ár, og tá taptu vit greitt fyri Fram. Ímóti Mjølni spældu vit hampuliga væl, men teir spældu eisini væl, og tað vórðu so teir, sum drógu longra stráðið. Men nakra kreppu haldi eg so avgjørt ikki, at vit kunnu tosa um. Eftir at Bartal og eg sjálvur hava verið eitt sindur skerdir av skaðum, tykist tað nú eisini soleiðis, at liðið er um at vera so væ fyri, sum tað er gjørligt, og í landskappingini hava vit hvørja ferð vunnið trygt á SÍ, so alt í alt haldi eg, at vit hava nakað at hava vónirnar í, sigur hann, og roynir sostatt ikki at renna undan teimum, sum hava ÍF sum favoritt undan finaludystinum.

At enda spurdu vit eisini Rúna, hvørjar lutir teir serliga skulu fáa at rigga, um teir skulu vinna allan vegin á mál leygardagin.

- Fyrst og fremst mugu vit fáa kantarnar og móttøkurnar at rigga. Ikki minst eru móttøkurnar týdningnarmiklar, tí við hesum fáa vit varierað álopsspælið somikið væl, at blokkurin hjá teimum skal hugsa um fleiri álopsmøguleikar. Vit hava gott fólk á øllum plássum, og tí kunnu vit variera nógv, men tað krevur altso, at móttøkurnar rigga.

- Og so skulu vit eisini ansa eftir Boban og Rajko. Teir eru somikið góðir leikarar, at teir skulu ikki sleppa ígongd, sigur altso Rúni Weihe at enda.